# Burtur við bummpengunum

**Unga valevni Sambandsfloksins í Vágum vil hava bummpengaskipanina undir Vestmannsundi burtur. Eisini vil hann hava dagføringar í Heimastýrislógini. Tær skulu fylgja nýskipanaruppskotinum hjá Sambandsflokkinum**

VALEVNI
*Edvard Joensen*


*Tað er órættvíst, at raksturin av tunlinum og vegnum í samband við hann skal gjaldast við brúkaragjaldi, Tí tað verður tað onga aðrastaðni í landinum*

*Mynd: Edvard Joensen*

**Sandavági:** Avtøka av bummpengaskipanini undir Vestmannasundi og nýskipan í viðurskiftunum millum Føroyar og Danmark eru tvey av høvuðsmálunum hjá unga sambandsvalevninum í Vágum, Gunnari Nattestad.

Hann býr í einum gulum húsum oman fyri vegin i Giljum í Sandavági. Tann 30 ára gamli Gunnar Nattestad, sum er stillaður upp til løgtingsvalið á sambandslistanum i Vágum.

Gunnar er miðvingur, sum er fluttur til Sandavágs, haðani konan, Helga Nordendahl, er ættað. Saman eiga tey tvey ára gamla Dávid.

Gunnar Nattestad er útbúgvin sivilverkfrøðingur við tjóðar- og virkisbúskapi sum sergrein. Hann hevur síðan mai 2000 arbeitt í Landsbankanum, og er ein teirra, sum dagliga ferðast til Havnar til arbeiðis.

Men Landsbankin og Sambandsflokkurin fylla kortini ikki alt lívið hjá Gunnari. Frítíðin verður eisini væl nýtt, greiðir hann frá.

Hann er virkin missiónsmaður. Hevur tikið nógv lut í ungdómsarbeiðinum í missiónshúsinum í Sørvági, sum er sera virkið.

At ein miðvingur, sum fluttur er til Sandavágs, skal brúka sína frítíð í Sørvági, heldur hann ikki vera nakað løgið í.

Hann byrjaði sum heilt ungur saman við fleiri øðrum miðvingum at fara til Sørvágs, har spennandi ungdómsvirksemi var í missiónshúsinum, og tað hevur so hildið við. Umframt er hann eisini við í sunnudagsskúlanum í Sandavági.

Men eisini onnur meira verðslig áhugamál eru at røkja í frítíðini. Millum annað sum skrivari hjá Vága Handverksmeistarafelag og formaður i Vága Vinnufelag. Og so er tað sjálvandi eisini Sambandsflokkurin, har hann serliga hevur verið virkin í Ungmannafelagnum Samband.

### Hugsjónir

– Tað eru hugsjónir, sum gera, at eg stilli upp til val. Eg vil royna at ávirka samfelagið. Eisini um eg ikki verði valdur, havi eg sum virkin í kjakinum møguleika at ávirka tey, sum vald verða. Eg standi fyri mínum egnu hugsjónum og ikki teimum hjá øðrum. So má veljarin gera av, um hann vil hava meg sum umboð, sigur Gunnar Nattestad, sum hevur greiðar meiningar um, hvat hann fer at føra fram í valstríðnum.

Hann hevur býtt sundur í tveir partar. Tann landspolitiska og tann lokal politiska, sigur hann. Tí hann er greiður yvir, at valstríðið í Vágum eisini fer at snúgva seg um lokalmál.

Fyrsta málið, Gunnar Nattestad ætlar sær at viðgera landspolitiskt, er ríkisrættarligu viðurskiftini millum Føroyar og Danmark.

Tað skuldi henda okkurt eftir seinasta val, sigur hann, men ásannar í sama andadrátti, at tað megnaðu teir, sum nú ráða, ikki at gera nakað við.

Hann vil hava, at tær broytingar, sum henda, vera í samsvar við nýskipanaruppskotið, sum Sambandsflokkurin hevur lagt fram, ásannandi, at Heimastýrislógin treingir til ábøtur og dagføringar.

Men sanniliga er eisini brúk fyri øðrum málum at viðgera, vísir hann á.

– Nú má annað á borðið enn bara fullveldi, sigur Gunnar Nattestad. Skilagóður eldrapoltikkur má rekast. Men minst líka týdningarmikið er, at hugsað verður um tær ungu familjurnar, sum skulu mynda framtíðar samfelagið í Føroyum, vísir hann á.


*Nú má annað á borðið enn bara fullveldi, sigur Gunnar Nattestad, valevni Sambandsfloksin til løgtingsvalið*

*Mynd: Edvard Joensen*

### Annað enn pensionistar

Tað er mikið gott við góðum umstøðum til pensionistarnar, sum eisini hava tað uppiborið.

Men tað er so sanniliga eisini neyðugt at geva teimum ungu barnafamiljunum livilig kor í landinum, skulu tey støðast her.

Tosað verður javnan um, hvussu lítið ein pensionistur fær at liva av. Men sannleikin er tann, at tey ungu fólkini hava ikki petti meira, hóast tey arbeiða bæði tvey.

– Tað sigur seg sjálvt, at fáa tey so betri møguleikar aðrastaðni, ja so fara tey, ásannar unga sambandsvalevnið í Vágum.

Hann vil arbeiða fyri, sigur hann, at tað gerst lættari hjá barnafamiljum at hava annað av foreldrunum heima hjá børnunum í longri tíð. Í hvussu er tey fyrstu árini hjá barninum.

Tað kann gerast á ymsan hátt, sigur Gunnar Nattestad, sum skjýtur upp, at broytingar verða gjørdar í stovnsgjøldunum.

Hann heldur, at gjøldini eiga at vera soleiðis, at tann, sum brúkar stovnin, skal gjalda tann veruliga kostnaðin. Hinvegin skal so ein afturrindanarskipan vera, sum gevur fóki so mikið aftur, at tey hava ráð at hava børn á stovni, um tey velja tað.

Tey, sum hinvegin velja at vera heima hjá børnunum og soleiðis ikki nýta stovnsplássið, skulu kortini hava fyrimunir av tí. Tað skal gerast við einum útgjaldi, heldur ungi sambandsmaðurin í Vágum. Hann metir, at stovnsplássini eru ein samfelagsrættur, sum allar barnafamiljur eiga, og tí eisini rætt til tann pening, tey spara samfelagnum við ikki at brúka stovnin.

### Lokalmál

Lokalmál eru fleiri at tríva í, sigur sambandsvalevnið í Vágum. Tað størsta er at virka fyri, at bummpengaskipanin, sum tosað verður um í samband við fasta sambandið undir Vestmannasundi, ikki verður til nakað.

Hann ásannar, at tann peningur, sum partafelagið Vágatunnilin hevur fingið til vega til íløguna uttan um fíggjarlógina, sjálvandi skal gjaldast aftur.

– Men tað er órættvíst, at raksturin av tunlinum og vegnum í samband við hann skal gjaldast við brúkaragjaldi, Tí tað verður tað onga aðrastaðni í landinum. Á tann hátt verða tey, sum ferðast undir Vestmannasundi, fyri vanbýtið, vísir Gunnar Nattestad á.

Eisini flogvøllin roknar hann sum eitt lokalmál. Tí hann hevur rættiliga stóran týding fyri oynna.

Hann vísir á, at nú er neyðugt at finna út av, hvør hevur ábyrgdina av flogvøllinum. Sum er tykist alt at vera steðgað upp, tí tvídráttur er um, hvør skal gjalda eina tiltrongda útbygging av flogvøllinum. Bæði leingjan av sjálvum vøllinum og eisini tann tekniska útgerðin, sum skal gera vøllin enn tryggari, enn hann longu er. Fyri ikki at tosa um sjálvan terminalin.

Danir vilja sjálvandi ikki gjalda ein vøll, sum føroyingar vilja yvirtaka. Har mugu vit so gera av, hvat vit vilja. Og yvirtaka vit vøllin, skulu vit eisini gjalda hann, sigur Gunnar Nattestad.

Men hann er tó ikki avvísandi fyri møguleikanum fyri, at vit royna at finna einahvørja avtalu við danir um at býta kostnaðin.

### Eingin kapping

Tað var fyri so vítt eingin kapping um at sleppa á sambandslistan i Vágum, sigur Gunnar Nattestad.

Tað hevur verið siðvenja, at stóru bygdirnar i oynni eru umboðaðar á sambandslistanum, og Gunnar roknar seg sum sandavágsmann á listanum.

Men hann sigur, at hann ikki fyrr, enn uppstillingarfundurin skuldi byrja, gjørdi endaliga av at stilla upp. Hann hevur fyrr roynt seg, men tá var tað sum umboð fyri Ungmannafelagið, sigur hann.

Hesaferð er hann sjálvur triði á listanum saman við einum fyrrverandi og verandi løgtingsmanni.

– Men tað mugu teir um. Eg ætli mær at føra míni sjónarmið fram, sigur Gunnar Nattestad.

Tað er lætt at vera sambandsmaður í Vágum. Verður úrslitið til løgtingsvalið líka gott sum til fólkatingsvalið, eru útlit fyri, at Sambandsflokkurin fær báðar menninar í Vágum.



# Illgruni er um, at útróðrarmenn eru burturgingnir, tí eingin hoyrdi neyðarkallið

**Tað er ein trupulleiki, at hoyrilíkindini á VHF'inum eru so vánalig á fleiri støðum, at tað er ómøguligt hjá útróðrarmonnum at fáa samband við Tórshavnar Radio. - Tað líkist ongum, at VHF-sendinetið ikki røkkur á øllum leiðum, nú vit skriva ár 2002, sigur Rúna Sivertsen, løgtingskvinna**

FISKIVINNA
*Vilmund Jacobsen*


*– Sum fiskivinnutjóð hava vit nógvar útróðrarmenn, sum fiska á leiðunum nær landi. Veðrið er óstøðugt og útróðrarlívið ikki vandaleyst. Tí er tað av alstórum týdningi, at bátar altíð hava møguleika at geva boð frá sær, sigur Rúna Sivertsen, sum hevur sett Bjarna Djurholm, landsstýrismanni, nakrar spurningar um VHF-sendinetið*

Í samband við, at málsøkið, »Radiogrundaða neyð- og trygdartænastan á havinum«, verður yvirtikið, hevur Rúna Sivertsen, løgtingskvinna, sett Bjarna Djurholm, landsstýrismanni nakrar fyrispurningar um VHF-sendinetið.

Løgtingskvinnan spyr, á hvørjum økjum VHF-sendinetið ikki røkkur og um nakrar kanningar eru gjørdar í hesum sambandi. Hon vil eisini hava at vita, hvat tað kostar at útbyggja VHF-sendinetið, so øll økir verða rokkin, og nær væntast kann, at netið verður útbygt, soleiðis at tað røkkur øllum leiðum í føroyskum sjóøki.

At enda spyr løgtingskvinnan, um tað er lógarfest, at bátar, sum er fevndir av løgtingslóg nr. 72 frá 13. mai 1992, skulu lurta á neyð- og kallibylgjuni, kanal 16.

### Neyðugt at kunna geva boð frá sær

– Sum fiskivinnutjóð hava vit nógvar útróðrarmenn, sum fiska á leiðunum nær landi. Veðrið er óstøðugt og útróðrarlívið ikki vandaleyst. Tí er tað av alstórum týdningi, at bátar altíð hava møguleika at geva boð frá sær, sigur Rúna Sivertsen í viðmerking til fyrispurningin.

Hon vísir á, at í løgtingslóg frá 13. mai 1992 um bjargingarútgerð á opnum bátum og á førum undir 20 tons, er ásett, at neyðsendari av VHF slagi skal verða umborð. Hesin skal ikki vera berbarur, men fastgjørdur.

– Men hóast henda áseting er ein víðkan í mun til altjóða áseting, er hetta ikki nóg mikið, tí VHF ikki hoyrist á fleiri leiðum, leggur løgtingskvinnan dent á.

– Tað er nevniliga ein trupulleiki, at hoyrilíkindini á VHF eru so vánalig á fleiri støðum, at tað er ómøguligt at fáa samband við Tórshavnar Radio. Menn, sum rógva út her um okkara leiðir, siga, at hoyrilíkindini ikki eru nóg góð, hvørki í Djúpunum, Kalsoyarfirði, Eiðisflógva og ei heldur í í Vestmannasundi, sigur løgtingskvinnan úr Norðoyggjum.

### Gingu burtur, eingin hoyrdi neyðarkallið!

Rúna vísir eisini á ein annan trupulleika, sum í hesum førinum liggur í hondunum hjá útróðrarmonnunum sjálvum. Hetta er, at menn eru ikki nóg raskir at lurta á neyð- og kallibylgjuni.

– Fleiri orsøkir kunnu vera til, at teir ikki lurta, men hesar eru so ikki nøkur umbering. Útróðrarmenn kunnu t.d. gloyma at skifta á kanal 16, tá ið teir hava tosað á aðrari kanal. Ein onnur orsøk er, at menn eru farnir at nýta fartelefon.

Fartelefonin kann vera hent, men er sum kunnugt ikki góðkend sum trygdarútgerð.

– Illgruni er um, at menn eru burturgingnir, tí eingin hevur hoyrt neyðarkallið frá teimum. Tað kann ikki prógvast, at teir hava sent út neyðarkall, tí teir bóru ikki boð í bý, sigur løgtingskvinnan.

### Sendinetið skal gerast forsvarligt

– Í einum oyggjalandi sum okkara, við nógv størri havøki enn landøki, er tað sjálvsagt nógvir, ið hava sítt dagliga yrki á sjónum. Og tað eru fá her á landi, sum ikki ferðast millum oyggjarnar, antin til arbeiðis, í ørindum ella fyri at njóta vøkru náttúruna.

Løgtingskvinnan heldur, at tað tí er óskiljandi, at hoyrilíkindiniikki eru nóg góð, og at VHF-sendinetið í 2002 ikki er forsvarligt.

– Hesi viðurskifti, sum fevna um trygd á sjónum, mugu fáast í rættlag, ongantíð ov skjótt. Skip og bátar skulu altíð hava møguleika at senda út neyðarkall, sum Tórshavnar Radio og aðrir bátar hoyra, so hjálpin kann veitast skjótast gjørligt.

Rúna Sivertsen heldur ikki, at krónur og oyru skulu vera ein forðing fyri einum forsvarligum VHF-sendineti í einum landi, har fiski- og útróðrarvinnan er ein so týðandi partur í samfelagnum.

Tí hevur hon sett landsstýrismanninum hesar fyrispurningar, nú nevnda málsøkið verður yvirtikið.

# Tørvur á fólki at skera við hond

**Trý skip landaðu á Tvøroyri mánadagin; í Miðvági er turt gólv**

FISKIVINNA
*Vilmund Jacobsen*


*– Vit kundu saktans havt nøkur fólk aftrat, serliga til hondskering. Nú er langt síðan, vit lýstu eftir fólki, men lýsingarnar góvu eingi úrslit, hóast hagtølini siga, at fólk enn eru arbeiðsleys. Vit hava eisini vent okkum til ALS, men heldur ikki har var nakað at heinta, sigur Bjarni Hansen, virkisleiðari á Fiskavirking á Tvøroyri*

Djúpvatnstrolararnir, Phoenix og Suðringur, landaðu ávikavist 100.000 og 160.000 pund til Fiskavirking á Tvøroyri mánadagin. Skipini høvdu svartkalva, kongafisk og upsa. Garnabáturin, Anita, var eisini á Tvøroyri mánadagin; teir høvdu 40.000 pund av svartkalva.

Bjarni Hansen, virkisleiðari, sigur, at nakað av fiski lá niðurfyri frá seinastu viku; so tey hava nóg mikið av ráfiski til alla hesa vikuna.

Á Fiskavirking á Tvøroyri hava tey arbeitt hvønn dag, síðan tey byrjaðu aftur, 7. januar.

– Allur svartkalvin verður skorin við hond, og í dag hava vit bara 8 hondskerarar. Pláss er til 20. So, hetta er ein ávísur fløskuhálsur á virkinum.

### Ringt at fáa fólk

Bjarni sigur, at teir hava nakrar hondskerarar aftrat, sum vanliga skera svartkalva, men hesir kílaskera flak eisini.

– Vit kundu saktans havt nøkur fólk aftrat, serliga til hondskering. Nú er langt síðan, vit lýstu eftir fólki, men lýsingarnar góvu eingi úrslit, hóast hagtølini siga, at fólk enn eru arbeiðsleys. Vit hava eisini vent okkum til ALS, men heldur ikki har var nakað at heinta hjá okkum.

Virkisleiðarin heldur, at tað ivaleyst er »lættari« at fáa fólk til kílaskering av flaki enn til at skera svartkalva.

– Fingu vit nøkur fólk aftrat, sum kundu kílaskorið, høvdu vit flutt tey, sum eru royndari, aftur til svartkalvan. Tað hevði økt um kapasitetin, sigur Bjarni Hansen.

### Turt gólv í Miðvági

Tá ið Sosialurin frætti mánadagin, høvdu tey á Fiskavirking í Miðvági bara fisk til hendan dagin aftrat; siðan verður helst turt gólv nakrar dagar, um ikki okkurt óvæntað stingur seg upp.

Albert Ellefsen, virkisleiðari, heldur, at óstøðuga veðurlagið í seinastuni er høvuðsorsøkin til, at minni fiskur er komin uppá land.

– So, vit vita ikki í løtuni, hvussu langur steðgurin verður, sigur virkisleiðarin. Tey arbeiddu annars hvønn dag í Miðvági í síðstu viku.